## VW við í OL í Kina



VW hava gjørt sáttmála við fyrireikararnar av Olympisku Leikunum í Beijing í Kina í 2008. Avtalan inniber, at allur flutningur í sambandi við leikirnar verður í VW bilum, sum umboða 23,5 prosent av kinesiska marknaðinum

*Kelda: Motor Magasinet*

## Peugeot sølumet



Í ár vænta Peugeot at sláa sítt egna sølumet frá 2002, tá teir seldu 1,95 milliónir bilar. Ein av orsøkunum er at nýggi Peugeot 407, sum júst nú er komin á marknaðin, er sera nógv eftirspurdur

*Kelda: Motor Magasinet*

## Kia í Slovakia



Kia gera eina ílegu upp á 8,2 milliardir krónur í eina bilverksmiðju í Slovakia, sum skal framleiða 300.000 bilar árliga. Hyundai bilar skulu eisini framleiðast á somu verksmiðju

*Kelda: Motor Magasinet*

# Peugeot 308 avloysir 307

*Nakað soleiðis kemur Peugeot 308 at síggja út, tá hann kemur á marknaðin. Allir Peugeot koma nú við stórum kølaragittari í kúfangaranum*



**Tá núverandi Peugeot 307, sum kom á marknaðin í 2001, fær sín avloysara, verður tað ein nýggjur 308. Bilurin líkist nógv nýggja Peugeot 407 framman**

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Hóast Peugeot 307 hevur hann staðið seg væl í hørðu kappingini í sokallaða Golf-klassanum, verður longu nú arbeitt við einum avloysara.

Nær tann bilurin kemur á marknaðin, vita vit ikki enn. Talan verður um ein 308, sum ikki verður heilt ólíkur nýggja Peugeot 407.

Peugeot 308 verður gjørdur í samstarvi við Citroën C4, sum kemur á marknaðin seinni í ár.

*Kelda: FDM / Motor*



*Aftan minnir Peugeot 308 nakað um aðrar kappingarneytar sum t.d. Opel Astra*

# Nýggjur Audi TT í 2006

*Audi TT er vorðin eitt flott "design ikon", tí verður designið á 2006 modellinum ikki so nógv broytt, men hesin sær munandi meira smartur og ágangandi út*



**Audi TT, sum fyrstu ferð kom á marknaðin í 1998, kemur í aðru generatión í 2006. Hóast bilurin líkist sær sjálvum, er designið meira smart og ágangandi við t.d. einum spoilara aftan, sum kemur upp automatiskt, tá ferðin økist**

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Hesi 6 árini Audi TT hevur verið á marknaðinum, hevur bilurin vunnið sær heiðurin sum eitt flott "design-ikon", tí verður avloysarin ikki so nógv broyttur í útsjónd.

Eins og forgangarin verður nýggi Audi TT bygdur yvir sama plattform sum Audi A3.

Servostýringin verður elektrohydraulisk, og bakhjólsupphangini verða av nýggja multilink systeminum, bæði á tvey- og fýrahjólsdrivnu útgávunum.

Í standard útgávuni verður motorurin ein 2,0 litur FSI-turbo við 200 hk, sum koyrir frá 0-100 km/t upp á 7 sek., og toppferðin verður úti við 250 km/t. Eisini verður ein 3,2 litur VR6 við 250 hk á skránni.

Audi TT, ið kappast við bilar sum t.d. Nissan 350Z og BMW Z4, kemur fyrst sum coupé og hálvt ár seinni sum cabriolet. Bilurin kostar millum hálva og eina millión krónur at keypa - alt eftir útgerð og motorstødd.



*Spoilarin aftan kemur upp automatiskt, tá ferðin økist*

# ítróttur

Nr. 146 • hósdagur • 5. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Bragdið hjá føroysku U-17 dreingjunum
s. 16-17

# Costin segði nei til Neistan

**Hóast alt nærum var komið upp á pláss, so segði fyrrverandi StÍF-venjarin, rumenin Costin Dumitrescu, í seinastu løtu nei til starvið sum venjari hjá Neistanum**

HONDBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo



*Formaðurin í Neistanum, Jón Kragesteen, harmast um, at tað glapp á stokkinum við at fáa Costin Dumitrescu til at venja Neistan komandi kappingarár.*

*savnsmynd*

Hondbóltsáhugaðir føroyingar hava seinastu mánaðirnar við spenningi bíðað eftir at frætt, hvussu tað gongur hjá teimum ymisku feløgunum við at fáa venjarar og spælarar til komandi kappingarár. Tey allarflestu av stóru feløgunum hava loyst venjaraspurningin, men hjá Neistanum hevur tað gingið striltið, og herfyri takkaði rumenin Costin Dumitrescu, sum áður hevur leitt strandingar til meistaraheitið, nei í evstu løtu.

### Tíðin byrjar at ganga undan

Formaðurin í Neistanum, Jón Kragesteen, sigur, at tað var óheppið, at Costin segði nei, hóast teir vóru komnir rættuliga væl áleiðis í samráðingunum. - Vit vóru nærum komin á mál, men so kendi Costin seg noyddan at siga nei av persónligum orsøkum, og tað noyðast vit í Neistanum sjálvsagt at virða, sigur Jón Kragesteen.

Hondbóltskappingin fer av bakkastokki fyrst í oktober mánaða, og formaðurin í Neistanum ásannar, at tíðin er við at ganga undan hjá teimum í strembanini eftir at fáa ein góðan venjara til besta manslíðið. - Vit hyggja allastaðnis, bæði her heima og uttanlands, eftir einum venjara, og eg vóni, at vit hava eina loysn heilt skjótt, men eg tori ikki at lova nakað, sigur Jón Kragesteen.

### Ivasamt við leikarum

Tað er ikki bert á venjaraøkinum, at allar súður ikki eru syftar enn hjá neistamonnum. Tað hevur ljóðað, at fleiri av leikarunum eru á veg úr felagnum, og nøvn sum Áki Mørk, Ari Rouch og Ragnar Stakksund hava allir verið settir í samband við H71. Um hesir høvdu farið úr Neistanum hevði tað verið ein stórur smeitur hjá felagnum, serliga tá ið havt verður í huga, at hetta eru tríggir leikarar, ið allir eru uppvaksnir í felagnum.



*Fyrrverandi leikandi venjarin hjá StÍF, Costin Dumitrescu, ið her er avmyndaður í dysti fyri strandingar, var um reppið at gerast nýggjur venjari hjá Neistanum.*

*Savnsmynd*

## Ítróttarstubbar

**Real Madrid** hevur enn í kvittanum at ogna sær franska Patrick Vieira frá Arsenal. Sambært The Sun er boðið komið upp á 200 milliónir krónur fyri Arsenal-liðskiparan, nú evstamark nærkast fyri at melda spælarar til Champions League.

Men David Dein, næstformaður í Arsenal, hevur sum minstaprís ásett 280 milliónir krónur, um samráðingar yvirhøvur skulu koma upp á tal.

Eygleiðarar meta, at sølurísurin fer at liggja millum hesi bæði tølini, tætt við 250 milliónir krónur.

Vieira er sjálvur áhugaður í at skifta felag, men hann krevur ikki eitt klubskifti við tí fyri eyga at halda gott samband við leiðsluna í felagnum.

Hósdagin er deadline fyri at melda spælarar til síðsta kvalifikatiónsrundan í Champions League. Real Madrid skal spæla móti vinnaranum av WIT Georgia Tblisi og Wisla Krakow.

**AaB** hevur longt sáttmálan við ein av profilinum á liðnum. Bárd Borgersen hevur fest sína undirskrift á blað, sum knýtir hann at felagnum fram til 2006.

Allan K. Jepsen longdi í vikuni sín sáttmála við AaB. Ítróttarstjórin í AaB, Lynge Jacobsen, er vælnøgdur.

– Bárd Borgersen er ein veldiga rutineraður spælari við drúgvum royndum. Bæði uttanfyri vøllin og inni á vøllinum er hann ein týdningarmikil maður fyri okkum, sigur ítróttarstjórin í AaB, Lynge Jacobsen.

Tann vælkendi **Totti**, sum spýtti á Christian Poulsen undir EM í Portugal, er skaddur, nú Seria A í Italia byrjar. Totti fekk skaða í knæði, tá Roma var á venjingarlegu í USA. Tað er sannlíkt, at Totti skal leggjast undir skurð. Hetta kemur eftir øllum at døma at merkja ein steðg upp á ein mánað.

Eisini Damiano Tommasi er uttanfyri við skaða. Hann oyðilegði sær krossbandið í venjingardysti móti enska Stoke.

**Stjørnuspælarin Luis Figo** hevur fingið at vita, at hansara sáttmáli við Real Madrid verður ikki longdur.

– Mínir løgfrøðingar siga mær, at felagið hevur ongar ætlanir um at leingja mín sáttmála, so inntil desember fari eg at hugsa um, hvat eg so skal gera, segði Figo aftaná eina venjing í gjár.

– Men indtil desember fara eg at leggja alt mítt hjarta og mína sál í at spæla fyri Real Madrid, segði Figo.

Luis Figo var ein av fremstu profilunum á portugisiska EM-liðnum, sum fekk eitt annaðpláss í kappingini um Evropameistaraheitið. Men hetta hevur eftir øllum at døma ikki ávirkað leiðsluna í Real Madrid.

– Tað er felagið, sum tekur avgerðina, og tað má eg góðtaka. Men eg má eisini taka eina støðu viðvíkjandi míni framtíð. Har eru ymiskir møguleikar, men eg fái ikki tikið avgerðina beint nú, segði tann 31 ára gamli Luis Figo.

**Danskir áleyparar** skoraðu øll málini, tá Bochum vann 3-0 móti hollendska De Graafschap. Peter Madsen headaði bóltin í netið tvær ferðir, og Tommy Bechmann skoraði eisini, tá fimm minuttir vóru eftir av venjingardystinum.

Og Niclas Jensen skoraði til 2-0 fyri Borussia Dortmund, tá teir vunnu 2-1 í venjingardysti móti hollendska Vitesse Arnhem.

71-ára gamli **Bobby Robson** verður ikki manager hjá Newcastle næsta ár. Hetta boðaði formaðurin í Newcastle frá um vikuskiftið.

– Vit hava ongar ætlanir um at leingja sáttmálan. Vit verða noyddir at hugsa um framtíðina, segði Freddy Sheperd, formaður, við The Sunday Mirror

Robson bleiv manager í Newcastle í kappingini 1999-2000, tá Newcastle striddist fyri at yvirliva í Premier League.